# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

*1. september fingu Lisbeth og Jóannes Næs, Klaksvík, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3100 gr. Stóribeiggin eitur Heini*



2. september fingu Elsebeth Syderbø og Hans Mikal á Fløtti, Klaksvík, ein son.

7. september fingu Bjørg og Leif Anderssen, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3100 gr.

8. september fingu Poula E. Thomassen og Marnar Johansen eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3800 gr.

9. september fingu Elin og Jørleiv Syderbø, Húsar, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3650 gr.

9. september fingu Jóna Midjord og Thordar D. Garðshamar, Tvøroyri, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4120 gr.

10. september fingu Anna Elisabeth og Johnny Petersen, Sandavágur, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3350 gr.

11. september fingu Ketty A. Hentze og Petur Hans Winther, Skopun, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3800 gr.

11. september fingu Elisa Heinesen og Peter Ibsen, Skála, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3600 gr.

12. september fingu Anita Højgaard og Jóhan Weihe, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3350 gr.

12. september fingu Nina Mikkelsen og Fróði Tróndheim, Fuglafjørður, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4200 gr.

13. sept. fingu Jacobina og Søren Nolsøe Sørensen, Taastrup, eina dóttur. Hon vigaði 3460 gr og var 50 cm long. Hon skal eita Dina.

15. september fingu Anina Juul Johannesen og Jóannes Hestoy, Funningur, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3100 gr.

15. september fingu Evy Olsen, Tjørnuvík, og Páll Rói Poulsen, Syðrugøta, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3600 gr.

15. september fingu Shino og Hallur Mortensen, Glasgow, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3665 gr.

15. september fingu Jóhanna Mathilda Vidtfeldt og Petur Drangberg Petersen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 4050 gr.

15. september fingu Evelyn Ó. og Jan Eskild Glyvradal, Haldórsvík, ein son. Hann var 48 cm langur og vigaði 2700 gr.

# Bachelorprógv í stjórnmálafrøði

Hósdagin 17. september 2009, fingu hesar bachelorprógv í stjórnmálafrøði á Fróðskaparsetri Føroya. F.v.: Gunnhild Dahl Niclasen, Conny Danielsen, Unn Hentze og Guðrið Krúnufjall

*Mynd: Rógvi Nybo*



# Gularøtur og frukt í M & M




*Jesper U. Sundien eigur og rekur handilin M & M í Vágsbotni, sum hevur alt sum finst innan fløgur og filmar*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Í sambandi við at handilin M & M í Vágsbotni fyllir fýra ár, eru øll vælkomin til gularøtur, frukt og saft leygardagin 19. september frá kl. 10-15, sigur Jesper U. Sundien, sum eigur og rekur handilin.

M & M, sum stendur fyri Music & Movies, er ein sonevndur "secondhand" ella "køb-salg-bytte" handil, og tann einasti av sínum slagi í Føroyum. Handilin læt upp í Sverrisgøta 9 í Havn tann 17. september 2005, og er hann sostatt fýra ára gamal. Í dag heldur handilin til í Vágsbotni.

Tað er Jesper U. Sundien sum eigur og rekur handilin, ið hevur alt sum finst innan fløgur og filmar.

Jesper sigur, at hóast talan er um ein secondhand handil, leggja tey stóran dent á kvalitetin, og at alt sum tey selja er í besta standi. Skuldi tað hent, at okkurt ikki riggar, so fær kundin pengarnar aftur, um hann ynskir tað.

Sum nakað nýtt hava vit heimskenda filmin "The Secret" og indisku seymmáttur við 6.000 plastikkpíkum til at stimulera kroppin. Vita hava eisini spesialiserað okkum í at útvega t.d. filmar og fløgur sum eru ring at fáa fatur í, so tey sum leita eftir onkrum ávísum eru vælkomin inn á gólvið ella at ringja til okkum, sigur Jesper U. Sundien.

Handilin er opin mánadag-hósdag frá kl. 12-17, fríggjadag frá kl. 12-18 og leygardag frá kl. 10-14.

Heimasíðan hjá handlinum er: mumo.dk.